## Starv

# Mekanikari til verkstaðið

Á verkstaðnum, sum er undir Farmaleiðum, er eitt starv sum mekanikari leyst at seta. Byrjast má skjótast gjørligt.

**Arbeiðsuppgávurnar á verkstaðnum**
Høvuðsuppgávan hjá verkstaðnum er at umvæla, samskipa og menna viðlíkahaldið av lastbilum, bussum o.ø. koyriútbúnaði hjá fyritøkuni.
Aðrar høvuðs-uppgávur eru:

- Tryggja ein støðugan rakstur av koyriútbúnaðinum
- Seta upp viðlíkahaldsmanna-gongdir- og ætlanir
- Hava dagligt eftirlit við koyriútbúnaðinum, herundir samstarv við Bileftirlitið, verkstøð og aðrar myndugleikar

**Starvið fevnir um**
Vanligt viðlíkahaldsarbeiði uppá lastbilar, bussar o.a. útbúnað.

**Førleikakrøv**

- Lastbil/trukkmekanikari ella tilsvarandi mekaniska útbúgving
- Stóra koyrikortið er ein fyrimunur
- Arbeiða sjálvstøðugt og hava lætt við at samstarva
- Góðan røkjuskap

**Setanartreytir**
Setanartreytir verða sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og avvarandi yrkisfelag.

**Umsóknir**
Áhugaðir mekanikarar skulu senda umsókn til:

***Strandfaraskip Landsins***
att. Starvsfólkadeildin
Boks 88
FO-110 Tórshavn

og skulu vera fyritøkuni í hendi í sein asta lagi 3. desember 2001, kl. 12:00.

Nærri upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til Heina á Borg, farmaflutningsleiðara tlf. 34 30 00 lokal 161, ella e-post: hab@ssl.fo

STRANDFARASKIP LANDSINS

*Høvuðsuppgávan hjá fyritøkuni er at lúka landsins tørv á innanlanda fólka- og farma-flutningi, og skal fyritøkan í so stóran mun sum gjørligt rekast á handilsligum støði. Fólka- og farmaflutningurin setir stór krøv um eina góða kundatænastu, herundir trygd, reglusemi og skjótleika.*

*Árliga rakstrarætlanin hjá Strandfaraskipum Landsins javnvigar við yvir 100 mió. kr. Talið á starvsfólkum svarar til 180 fulltíðarstørv, herav umleið 155 opera-tørar. Talið á flutningsanleggum er 12 skip, 40 bussar og 15 lastbilar. Flutningsuppgávurnar fevna um alt landið.*

# Fólk
## til Skiljihøllina hjá IRF á Hagaleiti

Søkt verður eftir trimum fólkum til Skiljihøllina hjá IRF á Hagaleiti, at byrja 2/1-2002, ella skjótast tilber.

Tey, ið sett verða í starv, koma at arbeiða í Skiljihøllini á Hagaleiti, men mugu tola at verða sett til onnur arbeiði innan IRF.

Tað er ein fyrimunur at hava arbeiðsroyndir, vera fyrikomandi og at hava góð samstarvsevnir.

**Galdandi sáttmáli:** Fastlønarsáttmáli millum FA og FAG.

Nærri fæst at vita um starvið við at ringja til tlf. 443343, ella 225383, Marius Jacobsen.

Skrivlig umsókn verður at senda til:

IRF
**IRF**
att.: Poul Andrias Joensen
Postboks 39 · FO-520 Leirvík

*innan 7. desember 2001*

Sosialurin -har tað hendir

# Sethús á Haraldstrøð 14, Tórshavn, til sølu



Um hóskandi boð fæst, verða húsini á Haraldstrøð 14 seld.

Støðd á grundøki 441 m².

Húsini eru í trimum hæddum: Kjallari 95 m², stovuhædd 95 m² og loftshædd 71 m².

Barnavinarligt umhvørvi og sera gott útsýni.

Nærri fæst at vita við at venda sær til:

**Advokatskrivstovuna**
**Fr. Petersensgøtu 9**
**100 Tórshavn · Tlf. 311145**
Halgir Winther Poulsen, adv.
Magnus S. Petersen, adv.
Fríða Patursson, adv.
Ó. J. Kristoffersen, adv.
Christian Andreasen, adv.
Niels Winther Poulsen, adv.

# Læknaval í Suðuroyar Sunnara Sjúkrakassa

Denise Andersson er komin í staðin fyri Viggo Jensen. Tey, ið ynskja at skifta lækna, skulu siga frá innan 1. desember á tlf. 373708.

**Sjúkrakassin**

# Teoriskúlin á Glyvrum

**Koyrikort nú!**
**-nýtt skeið er byrja**



Sosialurin - 311820

**Johan Beder, tel. 210 821**
**Ole Lykke, tel. 220 972**
**Hugo Kristiansen, tel. 225 225**

# Klárgerðing

Søkt verður eftir klárgerðingsfólki til klárgerðing av bilum a.

Koyrikort krevst.

CITROËN Mercedes-Benz MITSUBISHI
**Ivan Johansen Bilar**
**Tlf. 313666**
Spyr eftir Jón Johansen

veng-føroyar

Plátulutir
Kúfangarir
Kølaragittar
Kølarir
Lyktir
Síðuspegl
Beriarmar
Bensintangar



www.veng.dk

Veng Føroyar
Fo-335 Leynar

Telefon 42 17 67 Telefax 42 17 68 veng@post.olivant.fo

www.sosialurin.fo
www.sosialurin.fo



TÓRSHAVNAR KOMMUNA

# Løgfrøðingur

**Enduruppslag**

Vegna ov fáar umsóknir verður umsóknarfreistin, til starvið sum løgfrøðingur hjá Tórshavnar kommunu, longd til 5. desember 2001.

**Arbeiðsøki**
Høvuðsarbeiðsøkið hjá løgfrøðinginum er hjá skattakærunevndini, sum er kærumyndugleiki hjá skattaborgarunum í Tórshavnar, Nólsóyar, Kirkjubøar og Hests kommunu. Uppgávurnar eru m.a at viðgera kærur og at virka sum ráðgevi hjá skattakærunevndini í løgfrøðiligum spurningum innan skattaøkið.

Umframt arbeiðið hjá skattakærunevndini, verður løgfrøðingurin eisini ráðgevi hjá fyrisitingini hjá kommununi, har uppgávurnar eru sera ymiskar og fjøltáttaðar. Nevnast kann m.a. byggimál og alment innlit.

**Boðið verður**
Eitt spennandi og fjølbroytt starv við flextíðarskipan. Arbeiðsuppgávurnar eru sera ymiskar og geva tær tí møguleika fyri stórari fakligari og persónligari menning.

**Førleikakrøv**
Útbúgving sum sum cand. jur. ella líknandi útbúgving. Tað er ein fyrimunur, at umsøkjarin hevur royndir innan almenna fyrisiting ella skattaøki.

**Setunarviðurskifti**
Starvið verður sett skjótast til ber og er í fyrstu syftu roknað til eitt ár. Løn sambært sáttmálanum millum fíggjarmálastýrið og avvarðandi yrkisfelag.

**Meira fæst at vita**
Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Jens Marius Poulsen, kommunustjóra ella Leif Madsen, deildarleiðara tlf. 31 51 60.

**Umsókn**
saman við viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir, skulu vera Tórshavnar kommunu, Postboks 32, 110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi 5. desember 2001.

SNARSKIVAN

Sosialurin
Veðrið
Bilar
Lýsingar
Tíðindi
Viðmerkingar
Ítróttur
Nøvn
Skráir
Tiltøk

## Leiðarastarv

# Roknskaparleiðari

Søkt verður eftir leiðara til roknskapardeildina á Strandfaraskipum Landsins.

**Uppgávur hjá roknskapardeildini**
Høvuðsuppgávan hjá roknskapardeildini er at veita eina úrslitagóða búskaparfyrisiting, herundir samskipa, við-líkahalda og menna búskaparstýring-ina. Aðrar uppgávur eru:

- Fyriskipan av roknskaparverkinum
- Rakstrar-, íløgu- og likviditetsætlan, herundir langtíðarætlanir
- Roknskaparlig skráseting
- Roknskaparframløga, mánaðar- og ársroknskapir, herundir budgeteftirlit og játtanarroknskapir.

**Uppgávur hjá leiðaranum**
Høvuðsuppgávurnar hjá roknskaparleiðara-num verða:

- Ráðlegging, fyriskipan, raðfesting, samskipan og eftirlit í sambandi við búskaparstýringina
- Seta upp fíggjarætlanina við atliti til:
  - avmarking og útdelegering av avgerðarábyrgd
  - samskifti og samskipan millum stjóra og deildarleiðarar
  - motivatión fyri at røkka tilætlað úrslit
- Framløga av standard- og specialrapportum
- Menna innanhýsis mannagongdir í sambandi við gerð av fíggjarætlan, roknskapi o.ø.
- Fyriskipa upplæring, undirvísing og fakliga menning av starvsfólkunum á deildini
- Uppgávu- og starvslýsingar á deildini.

Í løtuni verður arbeitt við at umleggja búskaparskipanina hjá SL. Henda uppgáva verður ein spennandi avbjóðing fyri komandi roknskaparleiðaran, sum fær ein týðandi leiklut og ábyrgd fyri verkætlanini.
Eisini verður ætlaða byggingin av suðuroyarferjuni ein spennandi avbjóðing fyri roknskaparleiðaran.

**Førleikakrøv**

- Vinnu- og handilsútbúgving frá hægri lærustovni ella líknandi
- Royndir innan edv á høgum brúkarastøði
- Royndir innan fíggjarstýringarskipanir, so sum Navision Financials
- Royndir í projektleiðslu ein fyrimunur
- Málrættaður og arbeiðir analytiskt
- Góð leiðslu- og samstarvsevni
- Góð evni at orða seg bæði skrivliga og munnliga á føroyskum, donskum og enskum.

**Setanartreytir**
Talan er um eitt leiðarastarv við stórum og spennandi avbjóðingum, har leiðarin fær ábyrgdina av at umsita og menna eina týdningarmiklað funktión. Starvið gevur góðar møguleikar fyri persónligari og fakligari menning.

Starvið verður sett sambært avtalu, og er lønt í 36. lønarflokki sambært tænastumannalógini, tó uttan at starvið er tænastumannastarv. Eftirlønartrygging fylgir við starvinum.

**Umsóknir**
Umsókn við prósvkjølum skal sendast til:

***Strandfaraskip Landsins***
att. Starvsfólkadeildin
Boks 88
FO-110 Tórshavn

og skal vera fyritøkuni í hendi í seinasta lagi 17. desember 2001. Tað er ynskiligt, at tann, sum settur verður, kann byrja skjótast gjørligt.

Um tú ynskir nærri upplýsingar, kanst tú ringja til Reidar Nónfjall, stjóra.

Tlf. 34 30 00 ella e-postur: ren@ssl.fo

STRANDFARASKIP LANDSINS

*Høvuðsuppgávan hjá fyritøkuni er at lúka landsins tørv á innanlanda fólka- og farma-flutningi, og skal fyritøkan í so stóran mun sum gjørligt rekast á handilsligum støði. Fólka- og farmaflutningurin setir stór krøv um eina góða kundatænastu, herundir trygd, reglusemi og skjótleika.*

*Árliga rakstrarætlanin hjá Strandfaraskipum Landsins javnvigar við yvir 100 mió. kr. Talið á starvsfólkum svarar til 180 fulltíðarstørv, herav umleið 155 opera-tørar. Talið á flutningsanleggum er 12 skip, 40 bussar og 15 lastbilar. Flutningsuppgávurnar fevna um alt landið.*

# Sosialurin

Lesið Sosialin - tað loysir seg